Álit

í

løgtingsmáli nr. 59/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg, økt lániheimild og útlendsk fígging o.a.)

Landsstýriskvinnan í umhvørvismálum, Ingilín D. Strøm, hevur lagt málið fram tann 18. desember 2023, og eftir 1. viðgerð tann 23. januar 2024 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13., 20., 22. og 27. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Áhugafelagið lutaíbúðir, MARK, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Kommunufelagið, stýrið fyri Bústaðir, Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum og Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hervør Pálsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, Kim Durhuus og Henrik Old) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið er ein liður í at skapa ein fjølbroyttari bústaðarmarknað. Stórur tørvur er á bústøðum í Føroyum, og bústaðarmarknaðurin er ikki nóg fjølbroyttur. Tørvur er á góðum og fjølbroyttum bústøðum, har vit kunnu húsast ymiskt, og har eisini fólk við lægri og miðalinntøkum hava møguleika fyri at búgva.

Við at geva kommunum heimild at stovna almannagagnlig bústaðarfeløg saman við Bústøðum verður latið upp fyri einum nýggjum og øðrvísi møguleika, tá tað kemur til bústaðarbygging.

Skal tørvurin á bústaðarmarknaðinum nøktast, skulu mong átøk afturat fremjast. Hetta er ein liður í einum aktivari bústaðarpolitikki, sum skal gera tað minni trupult at seta búgv í Føroyum. Hesin møguleikin kann eisini viðvirka til at fáa fleiri leigubústaðir runt um í landinum. Samstundis verður møguligt við hesum almannagagnligu bústaðarfeløgunum at málrætta bústaðarbyggingina til ávísar bólkar, sum hava trupult við at fóta sær á bústaðarmarknaðinum.

Afturat nýggja møguleikanum við almannagagnligum bústaðarfeløgum verður lániheimildin til Bústaðir økt við 250 mió. kr., og kravið, um at Bústaðir skulu finna sær fígging í Føroyum, verður strikað, so Bústaðir frameftir eisini kunnu leita sær fígging uttanlands.

Tað hevur týdning, at almenni bústaðarpolitikkurin vendir sosialt rætt. Prísurin á leigubústøðum í Føroyum er ofta høgur, og tað eigur ikki at vera soleiðis í einum landi sum Føroyum, at fólk ikki hava ráð at gjalda fyri sín bústað, tí tøka upphæddin ikki røkkur til. Ein bústaður er so grundleggjandi fyri okkum sum menniskju, og tí mugu vit taka nøkur neyv og málrættað tøk fyri tey, ið hava truplast við at fóta sær á bústaðarmarknaðinum.

Undir nevndarviðgerðini vístu næstan øll, sum vóru til hoyringar, á, at tørvurin á eini skipan við býlisstuðli er alneyðugur fyri ein fjølbroyttari bústaðarmarknað og fyri at lofta teimum, sum ikki hava ráð at gjalda leigu. Meirilutin í Rættarnevndini tekur hetta til eftirtektar.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Helgi Abrahamsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Eftir at Húsalánsgrunnurin hevði verið rættiliga óvirkin í fleiri ár, varð í 2009 gjørd ein roynd at blása nýtt lív í aftur grunnin. Húsalánsgrunnurin hevði tá eina eginogn, sum var umleið 495 mió. krónur, og eitt gjaldføri, sum var umleið 355 mió. krónur.

Arbeitt varð við eini ætlan um at útlánsvirksemið hjá Húsalánsgrunninum skuldi avmarkast til orkulán og lán til íbúðafeløg og íbúðastovnar. Politiski dreymurin var at gera føroyska bústaðarmarknaðin meira fjøltáttaðan við einum breiðum úrvali av leiguíbúðum til fólk, sum ikki høvdu møguleika at finna *"ein virðiligan bústað á føroyska bústaðamarknaðinum undir tryggum leiguviðurskiftum,"* sum tað stóð í einum lógaruppskoti frá 2011 (løgtingsmál 77/2011).

Eisini stóð í uppskotinum, at Húsalánsgrunnurin skuldi virka sum eitt bústaðarpolitiskt amboð, hjá politisku skipanini, at røkka ymsum samfelagsgagnligum málum, ið ikki blivu rokkin undir vanligum marknaðarfortreytum á føroyska bústaðamarknaðinum. Uppskotið skuldi harafturat geva fólki, ið ikki funnu innivist á føroyska bústaðamarknaðinum, munandi betri møguleikar til at fáa ein hóskandi bústað fyri eina rímiliga leigu.

Húsalánsgrunnurin fór frá at virka sum útlánsstovnur til sethúsabygging til at virka sum eitt bústaðapolitiskt amboð, ið skuldi gera stórar íløgur í leigubústaðir. Leigukostnaðurin skuldi vera "rímiligur" – hvat tað so enn merkir.

Undir punktinum "Sosialar avleiðingar" stóð í viðmerkingunum til tingmál nr. 77/2011: *"Tíverri má ásannast, at fleiri familjur hava ikki nóg góðar bústaðamøguleikar. Tað veri seg støk, støk við børnum, fólk við serligum tørvi og familjur við lágum inntøkum. Øll, sum búgva í Føroyum, skulu hava rætt til ein góðan og virðiligan bústað."*

Politiski dreymurin var sostatt at fáa bygt nakrar bíligar bústaðir til fólk við serligum tørvi og familjur við lágum inntøkum.

Men veruleikin er tíverri tann, at tað ber ikki til at hava ein bíligari leigukostnað enn tað, sum svarar til byggikostnaðin – ikki uttan so, at rokningin verður send til onkran annan. Serliga tá ein vaksandi partur av íløgunum hjá Bústøðum er lánifiggjaður, økist kravið um eitt hægri leigugjald. Við ársenda 2023 var skuldin til peningastovnar 365,5 mió. krónur, og nú sæst, at leigukostnaðurin fer uppeftir.

Við hesum uppskotinum verður skotið upp, at lániheimildin hjá Bústøðum økist uppaftur meira, og eisini verður latið upp fyri møguleikanum at fara uttanlands at leita eftir fígging. Harafturat skulu Bústaðir kunna stovna almannagagnlig bústaðarfeløg saman við kommunum. Politiski dreymurin er framvegis, at Bústaðir skulu byggja bíligar bústaðir, sum borgarar við lágum inntøkum klára at gjalda. Avbjóðingin er hinvegin, at um leigugjaldið ikki samsvarar við byggikostnaðin, so má onkur annar,

so ella so, rinda fyri, at leigugjaldið er lágt. Tað kann eisini henda, at økta virksemið er við til at økja um eftirspurningin eftir handverkarum, og hetta kann eisini trýsta byggikostnaðin og harvið leigukostnaðin uppeftir.

Fíggjarliga orkan hjá kommununum er rættiliga ymisk, og av tí at kommunurnar umsita nógv málsøki, er ivasamt, hvussu høga raðfesting eitt samstarv um bústaðarbygging fer at fáa hjá teimum. Talan verður helst í stóran mun um lagaligar treytir fyri at fáa grundstykki, men tað fáa Bústaðir longu frammanundan.

Minnilutin tekur undir við, at vit eiga at royna at gera tað so lagaligt sum gjørligt hjá fólki at fáa tak yvir høvdið, men dugir ikki at síggja, at hetta uppskotið fer at loysa avbjóðingarnar, sum eru á føroyska bústaðarmarknaðinum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 11. apríl 2024

Hervør Pálsdóttir forkvinna	Helgi Abrahamsen næstformaður	Kristianna W. Poulsen
Henrik Old	Kim Durhuus	Steffan Klein Poulsen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur